

Sjúrður Johannesen
*Formaður SRF*

# Flugubein

Forkvinnan í Dansk Socialrådgiverforening Bettina Post skrivar í morgun, at tað almenna nýtir 60.000.000 um árið til umsiting og annað bureaukrati.

Síðani hugleiðir hon, at um vit hugsa okkum at ein triðingur bleiv avtikin, so høvdu danir havt møguleika at fingið 10.000 starvsfólk út at arbeiða við at loysa kjarnu uppgávurnar. Ella út til brúkara, har tann veruligi tørvurin er.

Samanbera vit við føroysk viðurskifti, eru vit helst fleir ið hugsa, at tað sama er við at henda í Føroyum og allarhelst er hent.

Umsiting "stjelur" so nógv av orkuni, at lítið er eftir til brúkaran, tá allar blankettir eru fyltar út og annað pappírsarbeiðið gjørt.

Eitt sindur hevur verið kjakast um hesi viðurskifti seinastu tíðina og ymiskt hevur verið hvar kanoin hevur verið vend , tá skuld og ábyrgd skal plaserast.

Mín hugsan er, at kanónin vendir skeivan veg. Tað ber snøgt sagt ikki til at læsta umsiting og leiðslu á til dømis Almannastovu og Nærveki fyri at umsiting av teirra málsøkjum eru so orkukrevjandi.

Krøvini frá politiskari síðu til umsitingina av til dømis sosial lóggávuni er ógvuliga stór og skal tað livast upp til hesi krøv, krevst ein stór umsiting.

Danir hava eitt hugtak í teir kalla "Planket Helvedet" vísandi til at tildømis heimahjálpir nýta tveir triðingar av tíðini inni hjá einum gomlum fólki til at seta krossar og flugubein í staðin fyri at vera nærverðandi hjá teimum gomlu tað løtuna tey eru har.

Um vit ikki ansa okkum, so eru vit skjótt í somu støðu sum Danir á hesum øki, og tað er tað Danir í løtuni royna at koma burtur úr.

Ein vegur at koma burtur úr hesum vandamálið, kundi verið at lækkað umsitingarligu krøvini til starvsfólkini úti í markini.

Gev teimum álit, tey eru skilagóð og røkja teirra uppgávur eftir bestu sannføring, tað er ikki neyðugt við øllum hesum kontrollinum.

Eingin skal ivast í, at verður álitið misnýtt, kemur tað einaferð fyri dagin, tað týdningarmikla er, at tað ikki forðar hinum øllum at gera sítt arbeiðið.

Um vit vilja tað ella ikki, so noyðast vit at gera okkurt munagott við henda trupulleika, tað ber ikki til, í hesum lítla landið at so nógv orka fyri til umsiting og at kanna hvønn annan um vit gera tingini á rættan hátt.

Tað má ikki henda at tey gomlu, tey sálarsjúku, tey menningartarnaðu og onnur ið hava ein serliga tørv, líða undir at so nógv flugubein skulu setast.

---



Hans Pauli Strøm
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*

# Sambandið og Fólkaflokkurin renna undan uppskoti um barnsins fyrsta sjúkradag

Sambandið og Fólkaflokkurin hava ikki hoyrt um og vilja ikki vita av uppskotinum, at eisini tímalønt skulu kunna vera heima barnsins fyrsta sjúkradag við lønarendurgjaldi. Hetta segði Útvarpið fyrr í vikuni. At hesir borgarligu flokkar ikki vilja vita av uppskotinum, er óivað satt út frá teirra politiska hugburði. Men at teir onki vita um tað, er beinleiðis ósatt.

Harumframt slapp Jørgen Niclasen eina góðu løtu at borðreiða við fleiri ósannindum viðvíkjandi uppskotinum. Eg gjørdi Útvarpið vart við hetta í einum teldupostì. Men Útvarpið letst sum onki. Tí henda rættleiðing til tað, sum varð framborið í tíðindunum.

### Fyrsta uppskotið framlagt av ABC-samgonguni í 2007

Lógaruppskot um hetta legði eg sjálvur sum landsstýrismaður í táverandi ABC-samgongu fyri løgtingið 2. nov. 2007. Tað var aftaná eina fundarrøð við partarnar á arbeiðsmarknaðinum, fyri at fáa teir sjálvar at avgreiða málið við tilstundandi sáttmálasamráðingarnar tá. Sambært arbeiðara- og hondverkarafeløgunum vístu arbeiðsgevarar hesum aftur, og vildu tey tí hava løgtingið til at fremja málið. Hesum fekk eg so undirtøku fyri, bæði á landsstýrisfundi og frá teim trimum samgonguflokkunum. Tað eydnaðist tó ikki at fáa málið avgreitt úr Trivnaðarnevndini, áðrenn val varð útskrivað, og tað datt tí burtur.

### Uppskotið til hoyringar hjá øllum pørtum

Uppskotið var sjálvandi til hoyringar hjá øllum relevantum pørtum. Teir søgdu tað sama tá, sum teir hava sagt allar tær nógvu ferðirnar, málið hevur verið í løgtinginum, og teir hava verið innkallaðir í Trivnaðarnevndina: arbeiðsgevarar ímóti - arbeiðara- og hondverkarafeløg fyri – og hvat annað skal man vænta?

### Landsstýrisfólk nokta at gera sum løgtingið sigur

Bæði í 2009 og 2010 hevur løgtingið samtykt, at landsstýrið skal leggja lógaruppskot um barnsisns fyrsta sjúkradag hjá tímaløntum fyri løgtingið. Men tey bæði landsstýrisfólkini hjá Sambandinum (Johan og Rósa), sum hava fingið hesi boðini frá løgtinginum, nokta at gera sum løgtingið hevur sagt. So er tað nakar, sum ikki bara brýtur parlamentariskar mannagongdir men eisini spottar løgtingsins vilja, so er tað landsstýrið.

### Nei frá Sambandi og Fólkaflokki at vera við

Tað er beinleiðis ósatt, tá løgmaður og varaløgmaður siga, at Sambandið og Fólkaflokkurin ikki vita av uppskotinum. Eg kunnaði teirra umboð í Trivnaðarnevndini um hetta, meðan eg fyrireikaði málið. Og áðrenn eg legði tað á tingborð, spurdi eg bæði Jákup Mikkelsen fyri Fólkaflokkin og Helga Abrahamsen fyri Sambandið, um teir vildu vera við til at leggja uppskotið fram. Teir góvu mær svar dagin eftir: Blankt nei fra Fólkaflokkinum, tí teir tóku ikki undir við slíkari ætlan. Helgi segði mær, at Sambandið segði nei, tí ein landsstýrismaður teirra (!) ikki vildi hava, at slíkt uppskot varð lagt fram.

### Sambands- og fólkafloksmenn í mongum sjálvdrátti

Tað er tí burturvið av løgmanni og varaløgmanni at briksla mær at bróta nakrar mannagongdir við at leggja hetta uppskot fyri løgtingið. Teir skuldu heldur tikið í nakkan á landsstýrisfólkunum, sum fingu hetta álagt fra løgtinginum, men ikki vilja gera tað kortini.

Annars vita øll, at hesi 2-3 seinastu árini hava fleiri sambands- og fólkaflokstingmenn í sjálvdrátti lagt lógaruppskot fyri tingið. Bæði Edmund Joensen og Anfinn Kalsberg hava lagt lógaruppskot um stríðsmál fyri løgtingið, uttanum samgongu og landsstýri. Jógvan á Lakjuni hevur gjørt tað sama. Eisini tann skikkiligi Helgi Abrahamsen. Og tann óforbetriligi Magni Laksafoss hevur gjørt tað fleiri ferðir. Tað er heldur ikki ókent, at landsstýrisfólk hjá hesum flokkum fleiri ferðir eru komin í løgtingið við málum, sum tey ikki hava fingið undirtøku fyri frammanundan frá samgonguflokkunum.

### Landsstýrið er løgtingsins tænari – ikki øvugt

Annars ljóðaði tað í útvarpstíðindunum, sum um løgmaður og varaløgmaður hava misskilt nakað heilt grundleggjandi í politisku skipanini í Føroyum: tað er ikki landsstýrið, sum stendur oman fyri løgtingið og dikterar, hvat løgtingið skal trúgva og gera, men øvugt: tað er løgtingið, sum er arbeiðsgevari hjá landsstýrisfólkunum. Tey eru sett at útinna tær avgerðir, sum løgtingið tekur. Eisini tá tað snýr seg um fyrsta sjúkradag hjá børnum hjá tímaløntum foreldrum.